e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20



# Johan skal spæla vi› OB

*Nú er greitt, at hvørki B68 ella GÍ fara at fáa gagn av fótbóltsevnunum hjá Johan Byrial Hansen*

Í fyrradagin frættist, at danska superligu felagi› OB hevur skriva› sáttmála vi› Johan Byrial Hansen. Johan, sum fram til summarste›gin ver›ur í 1. deildarfelagnum Horsens, er dani, men bæ›i foreldrini eru úr Føroyum. Pápin er úr Fuglafir›i, og mamman er av Toftum (hon er systir til Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjara hjá Allani Simonsen).

At 24 ára gamli Johan Byrial Hansen, sum er beiggi til fyrrverandi landsli›sspælaran í hondbólti Anju Byrial Hansen, hevur gjørt avtalu vi› OB um, at fótbóltsframtí›in hjá verjuspælaranum skal vera í Odense er ikki heilt óvi›komandi fyri føroyskan fótbólt.

Ta› hevur nevniliga ljó›a›, at bæ›i B68 og GÍ hava havt samband vi› danska spælaran. Ta› hevur veri› áhugi í bá›um feløgunum fyri at kn‡ta Johan Byrial Hansen at sær, tá sáttmálin vi› Horsens gongur út í summar, men nú ver›ur ta› hvørki verjan hjá B68 ella GÍ, sum fær gagn av danska spælaranum vi› sterku ættarbondunum í Eysturoy.

Men ta› átti kortini ikki at veri› heilt óhugsandi, at komandi superligu spælarin (ta› ver›ur hann, um OB megnar at halda tørn um sessin í bestu deildini í Danmark) í framtí›ini fekk meiri vi› føroyskan fótbólt at gera, enn hann higartil hevur havt. Onkuntí› hevur veri› upp á tal, at Johan Byrial Hansen átti at veri› eitt upplagt evni til landsli›i› hjá Allani Simonsen, men higartil er ikki meiri komi› burturúr hesum enn bara hugsanin um møguleikan.

### Rósandi or›

Sambært donskum fjølmi›lum er ta› Troels Bech, sum í summar fer at taka vi› venjarastarvinum í OB, i› hevur mælt lei›sluni í felagnum í Odense at skriva sáttmála vi› Johan Byrial Hansen. Troels Bech hevur á›ur veri› venjari hjá Horsens og harvi› Johan Byrial Hansen, og í donskum fjølmi›lum hevur hann spátt, at verjuspælarin fer at gerast ein av stu›lunum hjá OB:

– Hann hevur gó› fótbóltsevni, og hann hevur gó›an vilja. Sjálvandi fer ta› at taka sína tí› hjá honum at venja seg vi› at spæla í superliguni, men eg eri sannførdur um, at Johan Byrial Hansen fer at roynast væl í OB, sigur Troels Bech.

Johan Byrial Hansen, sum altso hvørki ver›ur B68ari ella GÍari í summar, hevur skriva› undir eina avtalu vi› OB, sum ver›ur galdandi í tr‡ ár.

**jh**

# Jens Kristian venur vi› GÍ



*Møguliga skal Jens Kristian avloysa Poul Ennigar› í mi›verjuni hjá GÍ, tí hann skal ni›ur á skúla seinni í ár*

*Møguleiki er fyri, at grønlandski landsli›sma›urin, sum á›ur hevur spælt vi› ÍF, aftur ver›ur at síggja á føroysku graslíksvallunum*

Um Johan Nielsen heldur, at hetta kann ver›a vi› til at styrkja um 1. deildarhópin hjá GÍ, so er ta› væl hugsandi, at Jens Kristian Eldevig fer at spæla vi› GÍ í summar.

Jens Kristian hevur vant vi› GÍ í hesi vikuni, og vit skilja á lagnum, at stø›a ver›ur tikin til møguligt samstarv heilt skjótt. Fuglfir›ingurin í Grønlandi er ikki í fullgó›ari venjing, men fyritreytirnar at koma í venjing eru hesa ársins tí›ina ivaleyst væl betri í Gøtu, enn tær eru í Grønlandi.

Jens Kristian Eldevig spældi í áttati árunum vi› ÍF. Hann var verjuspælari og spældi í vinstra bor›i ella í mi›verjuni. Sí›ani hann flutti til Grønlands at búgva, hevur Jens Kristian veri› á grønlendska landsli›num, sum m. a. hevur tiki› lut í fótbóltskappingunum á oyggjaleikunum. Jens Kristian Eldevig hevur veri› so nógv avhildin, at grønlendingar so seint sum í fjør valdu hann sum ársins fótbóltsspælara.

### Nógv hol skulu tettast

Gøtumenn halda seg ikki hava serliga brei›an 1. deildarhóp. Teir hava mist fleiri spælarar – eitt nú er Sámal Joensen farin til Leiftur, og Henning Jarnskor sigst vera á veg til Vál í Reykjavík.

Poul Ennigar› spældi í mi›verjuni á Sevm‡ri sunnudagin. Men hann fer skjótt til Danmarkar á tekniskan skúla, og tískil ver›ur hann buturfrá í fleiri vikur í vár. Um avtala ver›ur gjørd vi› Jens Kristian Eldevig, so ver›ur ta› ivaleyst vi› tí fyri eyga, at hann skal tippa holi› eftir Poul Ennigar›. Sum sagt so ver›ur ta› avgjørt seinni í vikuni, um Jens Kristian Eldevig skal hjálpa gøtumonnum í summar.

Rúni Justinussen, sum í fleiri enn tíggju ár hevur veri› vongverji hjá GÍ, hevur ikki vant higartil í ár. Nú skilja vit á lagnum, at ta› er ikki óhugsandi, at hann fer at leita fótbóltsskógvarnar fram aftur, men hann ver›ur neyvan at síggja á besta li›num beinanvegin.

**jh**

Lesi› ítróttin á internetinum



www.sosialurin.fo

## Flogbóltur!

Heini í Skorini

ASV Århus, li›i hjá kvinnuliga føroyska flogbóltsleikarin í Danmark, Juannu Schrøter Joensen, spældi sín seinasta dyst í endaspælinum í elitudeildini móti Ålborg, og nú taptu tær sín fyrsta dyst í sjálvum endaspælinum, men ta› var ógvuliga tepurt. Juanna Schrøter Joensen sigur, at seinasti javnbrótarin enda›i 5-7, og hetta gjørdi, at bæ›i li›ini enda›u jøvn í stigum, men Ålborg hev›i eitt sett meiri, so endaliga stø›an hjá Juannu og li›feløgum hennara í ASV Århus gjørdist eitt 6. Pláss. Annars skal Juanna aftur í eldin komandi tvey vikuskiftini, av tí at hon er úttikin til eitt u-22 li› hjá ASV Århus, i› skal luttaka í eini kapping millum fleiri onnur donsk li›.



# Søljan vann gull



*Vinnarar av a›ru deild, Søljan*

Fyri gó›ari viku sí›ani var greitt, at Sóljan hevur vunni› kappingina í a›ru deild hjá kvinnum. Vi› sigringum hevur Vágoyggin aftur fingi› li› vi› í fremstu hondbóltsrø›ini, har oyggin ikki hevur havt umbo›an seinnu árini.

Um vikuskifti› spældu teir so seinasta dystin, og eftir henda fingu tær handa› hei›ursmerkini.

Standandi frá vinstru: Kristianna, Jóna, Heidi Maria, Sólja, Heidi, Marjun, Andrea og Albert (venjari) Húkandi frá vinstru: Ruth, Petra, Ann Mari, Sóley, Hertha, Hertha og Jóhanna

# Guttorm og Rigmor vunnu fyrstu rennikappingina í ár

Fyrsta rennikappingin í ár var› hildin leygardagin í Runavík. Teinurin, i› runnin bleiv, var 10 kilometrar, og 13 luttakarar vóru til kappingina, 12 mans og ein kvinna.

Líkindina at renna vóru gó›. Hóast ta› hev›i regna› um morgunin, var turt, me›an kappingin fór fram. Hitin var um tey sjey stingini, og ta› var eitt líti› lot.

Hjá monnunum gjørdist Guttorm Sørensen vinnari vi› tí›ini 35,52 min. Hann leg›i seg á odda beinan vegin og helt lei›sluna heilt á mál. Tí›in hjá Guttormi var heldur seinni enn vinnaratí›in í fjør, men samanumtiki› vóru tí›irnar heilt gó›ar, seks teir fyrstu rennararnir runnu teinin undir 40 minuttir.

Rigmor N. Joensen var einsamøll kvinna í kappingini. Undan kappingini ætla›i hon at renna teinin upp á umlei› 40 minuttir, og hon kom á mál í tí›ini 40,04 min. So hetta passa›i heilt væl vi› ætlanina hjá henni.

Næsta rennikappingin ver›ur 8. apríl, tá runni› ver›ur frá vegnum til Funningsfjar›ar og út á Toftir. Teinurin er eitt 1/2 marathon, ta› vil siga 21,1 kilometrar.









# Fleyr fekk hevnt steypaósigurin

*Flogbóltur: Seinasta flogbóltskappingin í hesum kappingarárinum var í Vágunum seinasta vikuskifti*

Terji Nielsen

Endabresturin á flogbóltskappingarárinum 1999/2000 var um vikuskifti, tá i› flogbóltsfelagi› Dráttur í Vágum skipa›i fyri stórari kapping fyri teimum eldru li›unum. Ikki færri enn 44 li› tóku lut í kappingini, og er hetta á lei› sama luttakaratal sum undanfarin ár.

### TB og Mjølnir vunnu tvær deildir hvør

Undan finalunum, sum allar vóru leiktar sunnudagin, vi› undantaki av finaluni í meistaradeildini hjá kvinnum, var størsti spenningurin um, hvørt ta› fór at eydnast monnunum hjá Fleyr at hevna steypaósigurin ímóti Mjølnir, sum teir máttu lúta fyri í steypakappingini. Ta› eydna›ist hjá Fleyr í einum spennandi dysti at vinna 2-1, og hetta var kanska eitt líti› plástur á sári› fyri steypaósigurin.

Í meistaradeildini hjá kvinnum vóru ta› eisini Fleyr og Mjølnir, sum hittust í finaluni, og hendan dystin vann Mjølnir 2-0.

Bæ›i 1. deild kvinnur og 2. deild kvinnur vann TB. Í 1. deild var mótstø›uli›i› KÍF, og hendan dystin vann TB 2-0, me›an 2. deildarli›i› hjá TB vann 2-0 á Fleyr B í finaluni í 2. deild kvinnur.

Í 1. deild hjá monnum dysta›ust Mjølnir og Fleyr B í finaluni, og hendan dystin vann Mjølnir 2-1. Finalan í 2. deild hjá monnum gjørdist ein rein Sørvágsuppger›, tá i› B og C li›ini hjá SÍ hittust í finaluni. Endaliga úrsliti› av tí dystinum gjørdist, at SÍ C vann 2-1.



